# Sambandið ikki at steðga

**Nýggja veljarakanningin gevur sambandsflokkinum ein tingsess afturat, og Tjóðveldið missir tveir. Miðflokkurin stendur eisini at vinna ein tingsess**



| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 7 tingfólk |
| Sambandsflokkurin | 9 tingfólk |
| Javnaðarflokkurin | 7 tingfólk |
| Sjálvstýrisflokkurin | 1 tingfólk |
| Tjóðveldisflokkurin | 6 tingfólk |
| Miðflokkurin | 2 tingfólk |
| Landsstýrisfólk, ríkisumboð og embætisfólk | |




*Tingmannabýtið eftir kanningini, samanborið við løgtingsvalið 2001*




*7,1 prosent svaraðu, at tey ikki vistu, og 3,8 prosent at tey antin ikki fóru á val ella fóru at atkvøða blankt*




Í prosentum av atkvøðunum hevði staðið á jøvnum millum gomlu samgonguna og báðar andstøðuflokkarnar









# Tjóðveldisflokkurin sligin upp á pláss

**Tvær sera einfaldar gongdir eru í nýggjastu veljarakanningini. Sambandsflokkurin gongur fram og Tjóðveldisflokkurin missir fótafestið millum føroyingar. Gamla samgongan og andstøðan standa til 50 prosent av atkvøðunum hvør**



VELJARAKANNING

*Ingi Rasmussen og Øssur Winthereig*

Sambandsflokkurin hevur síðani løgtingsvalið í apríl í fjør staðið til eina framgongd. Og veljarakanningin, sum Gallup og Fjølmiðlaráðgevingin hava gjørt fyri Sosialin og Útvarp Føroya staðfestir hesa gongdina.

Sambandsflokkurin stendur til eina framgongd upp á 3,7 prosentstig í mun til valúrslitið og hevði fingið 29,7 prosent av atkvøðunum, um val hevði verið nú.

Stóri taparin hevði verið Tjóðveldisflokkurin. Flokkurin hevði fingið eina afturgongd upp á 4,3 prosentstig og var endaður sum minsti flokkurin av teimum fýra stóru við 19,4 prosent av atkvøðunum.

– Tjóðveldisflokkurin fekk sína stóru framgongd við fullveldinum, men nú er fullveldið meiri ella minni tikið av skránni, so nú sær út til at flokkurin endar aftur har, sum hann var áðrenn valið 1998, sigur Jóannes Hansen, valkønur.

## Vistu ikki

Gallup Føroyar og Fjølmiðlaráðgevingin hevur gjørt kanningina. 510 fólk vóru spurd, hvønn tey ætlaðu at velja á løgtingsvalinum 20. januar.

Uppringingarnar vóru gjørdar í seinastu viku áðrenn greitt var at "Hin stuttligi Flokkurin" stillaði upp. 7,1 prosent vistu ikki, hvat tey ætlaðu at velja og 3,8 prosent søgdu seg antin ikki fara á val ella atkvøða blankt.

## Hinir standa í stað

Allir hinir flokkarnir - uttan Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin - standa í stað. Við tí óvissu, sum er í slíkum kanningum, so ber ikki til at tosa um framgongd og afturgongd, tá broytingarnar eru so smáar. Fólkaflokkurin stendur í stað við sínum umleið 20 prosentum. Ofta verður sagt um Fólkaflokkin, at hann ikki stendur seg væl í veljarakanningum. So er spurningurin um hetta talið er tekin um, at hann í roynd og veru stendur til vøkstur ella um flokkurin hesiferð fær rættari tøl í eini veljarakaning.

Javnnaðarflokkurin, sum hevur verið í andstøðu tykist hava trupult at vinna seg fram. Flokkurin verður sambært kanningin liggjandu á 20 prosentum av atkvøðunum.

Miðflokkurin hevur eina lítla framgongd og sjálvstýrisflokkurin stendur at verja borg.

## Javnt millum gomlu samgongu og andstøðu

Í prosentum eru Føroyar enn kvettar tvørtur um millum gomlu samgonguna og gomlu andstøðuna. Í prosentum hevði núverandi samgongan við Tjóðveldisflokkinum fingið 49,7 prosent og andstøðan 50,3.

Eftir valið 2001 hevði samgongan, sum tá var skipað, 53,1 prosent og andstøðan 46,9 prosent..

## Tingbýti

Tað ber til at rokna tingmannabýti útfrá eini kanning, men óvissan verður stór, tí ikki verður lagt upp fyri, at summi valdømi eru sera smá og at óvissa er um, hvussu eykavaldu tinglimirnir fella.

Men verður royndin gjørd við verandi kanning, sum grundalag, so missir Tjóðveldisflokkurin tvey umboð á tingi og tey vinna Sambandsflokkurin og Miðflokkurin.

Miðflokkurin stendur til eina framgongd upp 0,7 prosent, men í útrokningunum av tingsessum, gevur tað altso ein tingsess afturat.

Verður hugt eftir samgongumøguleikum, hevði verandi andstøða fingið 16 tingsessir - Sambandsflokkurin 9 og Javnaðarflokkurin 7. Sostatt hevði tað ikki verið nóg mikið til meiriluta.

# Nøvn og tøl

ÚTGREINGING

*Jóannes Hansen, valkønur*

Um vit skulu royna at seta nøvn á, hvat hevði hent um kanningin var valúrslitið, so skulu vit hava serlig fyrilit. Fyrilit skal sjálvandi takast fyri, at talan ikki er um kanning í valdømunum. Tilsaman eru stívliga 500 veljarar í øllum landinum spurdir, og tað er ikki nóg nógv til eina sovorna kanning. Men um vit siga, at rákið verður tað, sum sæst í kanningini, og einki serligt tekur seg upp í onkrum valdømi, so ber væl til at ímynda sær, hvat kundi hent:

Tað liggur til, at Tjóðveldið skal missa ein av trimum umdømisvaldum í Suðurstreymi og tann, sum teir hava í Norðstreymi. Um persónligu atkvøðutølini høvdu havt verið umleið tey somu, sum tey vóru í 2002, so liggur tað til, at Kaj Leo Johannesen skal gerast umdømisvaldur í Suðurstreymi og Heðin Zachariassen í Norðurstreymoy. Miðflokkurin fær ein eyka afturat, og hann verður í Eysturoy, og Sambandsflokkurin fær ein eyka afturat í Norðoya valdømi. Har hava teir ikki havt tingmann síðani 1984.

Eli Nolsøe, sáli, var eykavaldur 1978–1984. Tað komst av framgongdini, sum Sambandsflokkurin hevði kring alt landið. Sambandsflokkurin var ikki nóg stinnur at vinna sær umdømisvalt umboð í Norðoyggjum, men Pauli Ellefsen effektin bar ein eykavaldan í Norðoyggjum við sær. Tá ið Pauli hevði verið løgmaður í fýra ár, misti flokkurin eykavalda umboðið í Norðoyggjum.

Nýggja andlitið kann gerast Magni Laksáfoss, sum fekk flest atkvøður á Sambandslistanum í Norðoyggjum í 2002. Nýggja andlitið í Eysturoy kann blíva Bill Justinussen ella onkur annar. Tordur Niclasen fekk flestar hjá Miðflokkinum í Eysturoy í fjør, men hann sigst ikki fara at verða á listanum hesa ferð.

Lat meg enn eina ferð undirstrika, at talan er um kanning, sum ikki er nóg stór til at býta valdømisvaldar tingmenn. Metingin er grundað á miðaltøl fyri alt landið. Um vit skulu gera eina kanning, har vit orduliga manna tingið, so mugu vit spyrja eini 400 í hvørjum valdømi. Tað varð gjørt undan valinum í 2002.

Men nú vita flokkarnir, hvar teir eru staddir, áðrenn teir av álvara fara undir valstríðið. Hetta gevur í hvussu so er Sambandsmonnunum í Norðoyggjum og Miðflokkinum í Eysturoy blóð á tonna!

Samgongumøguleikarnir út frá tingmannabýtinum, sum kanningin vísir, eru fleiri. Tað er lítið sannlíkt, at somu flokkar, sum hava verið í samgongu, fara at halda fram saman. Sambært kanningini hava teir mist meirilutan. Hetta tingmannabýtið leggur upp til gomlu heimastýrissamgonguna – B+C+D. Spurningurin er, um D vil "gera tað liðugt" við A, sum teir síðani 1998 hava verið í politiskum hjúnarlagi við. Ein annar møguleiki er borgarlig samgonga – A+B+H+D (er bara neyðugt við D ella H fyri at røkka 17), og ein annar er A+C+D+H.


## Ein spennandi greipa …




**SKIPALISTIN 2004**
hevur lógarkravdan føroyskan álmanakka, streymtalvur og streymkort umframt dagførdar upplýsingar og hópin av nýggjum myndum av føroyska flotanum. Tilfarið í *SKIPALISTANUM* er álítandi og viðkomandi hjá øllum teimum, ið hava áhuga fyri skipi og sjógvi.

***Skipalistin – hentur at hava!***

SKIPALISTIN 2004 kostar **kr. 175,-** og innbundin **kr. 240,-**




**JOHN DAM**
er ein hin týdningarmesti skiparin og vinnulívsmaðurin í føroysku siglingarsøguni. Hann var undangongumaður í rækjufiskiskapinum, men eisini innan laksa- hemara- og skeljaveiðu gekk hann ótráddar leiðir. Hetta er ein lívssøga um áræði og framskygni, soltnar tíðir og gulltíðir, vónir og vónbrot, eydnu og lagnu. *JOHN DAM* er 400 blaðsíður við hópin av spennandi myndum.

Bókin er innbundin og kostar **kr. 295,-**

REPROZ

**– Fæst í bókabúðunum**